## Veteranar á vøllin

Fyri fyrstu ferð í ár valdi John Petersen at byrja inni millum teir fyrstu ellivu, tá Skála skuldi í botnstríð móti B68. John, sum júst er fyltur 36 ár, hevur annars sett seg sjálvan í leiklutin sum jokari á beinkinum, men hesa ferð metti hann, at hann gjørdi størri nyttu við at byrja inni. Og hann var ikki einasti veteranurin við málum í gaggunum. Súni Fríði Barbá, sum í ár er hjálparvenjari hjá B68, kom eisini á vøllin seinastu 20 minuttirnar. Teir báðir eru spælararnir, sum eiga flestu málini í føroyskum fótbólti í nýggjari tíð, men mikukvøldið kundi so hvørgin teirra leggja nakað afturat í so máta.



## Eitt ár á muni

Í yngra høvuðsstaðarfelagnum, B36, erpa tey sær av ungu manningini, sum hevur staðið seg væl í hesum kappingarárinum. Munurin á miðaldrinum var tó ikki stórur mikukvøldið. Útskiftingin í hópinum hjá B36 í vetur var stór. Stórleikararnir frá í fjør, Fróði Benjaminsen, Amed Davy Sylla og Jákup Mikkelsen vóru millum nøvnini, sum ikki hildu fram í felagnum. Árstalsfelagið gjørdi greitt, at yngru leikararnir skuldu bera liðið í hesum kappingarárinum, og higartil hava úrslitini eisini verið á einari leið. Mikukvøldið endaði grannauppgerðin millum B36 og HB við málleysum javnleiki. Verður hugt at miðaalaldrinum á liðunum í gjár, so er munurin tó ikki so ógvuliga stórur. Miðaalaldurin á teimum fyrstu ellivu var hjá B36 26 ár, meðan hann hjá HB var 27,18 ár. Við innskiftarum var miðaalaldurin ávikavist 24,5 og 26,23 ár.

HB-B36 0-0:

# Málleys havnarlið

*HB*

*B36*

**Tvær ferðir hava tey dystast í kappingardystum í ár. Men enn hava hvørki HB ella B36 skorað ímóti grannunum. Men møguleikarnir vóru tó til tað hesaferð**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað varð givið og tikið av heilum hjartað í Gundadali. Og hóast spælararnir vóru málleysir, so var hetta langt ífrá galdandi fyri áskoðararnar, sum fingu ein fínan fótbóltsdyst*

*savnsmynd*

Talaln var um alt annað enn keðiliga nulloysn í Gundadali mikukvøldið. Á einum hampuliga vátum vølli, sum legði upp til skjótt spæl eftir graslíkinum, spældu grannarnir báðir ein ferðmiklan, undirhaldandi og til tíðir heilt væl spældan dyst. Og hóast málleyst, so varð talan kortini um úrslit, sum báðir partar kundu vera so hampuliga væl nøgdir um.

### Barcelona-stílur

Í eini viku, sum fyri tað nógva eisini varð merkt av Champions League hálvfinalunum, kunnu sammetingar sjálvandi gerast, og í so máta er ikki heilt burtur við at sammeta HB-spælið við tað, sum Barcelona sýndi í tveimum hálvfinalum móti Manchester United.

Tí mált eftir possession, so er eingin ivi um, at HB var greitt omaná móti B36, eins og teir eisini vóru tað í fyrru hálvfinaluni í kappingin um Løgmanssteypið.

Stóri trupulleikin hjá HB var tó, at teir sjáldan skaptu tað heilt nógva. Tær ferðirnar, at teir veruliga gjørdust vandamiklir, var, tá Christian Høgni Jacobsen slapp at reika nakað út í borðini. Fleiri ferðir snaraði hann Dmitrij Jankovic ella Magnus Olsen av sær, og á tann hátt skapti yvirtalsstøður í álopspartinum.

Hinvegin var Christian Høgni ein av stóru syndarunum, tá hann í tveimum førum fekk heilt góðar møguleikar. Men tann partin var hann nú ikki heilt einsamallur um, tí bæði Andrew av Fløtum og Jákup á Borg høvdu eisini sínar møguleikar.

Størsti vansin hjá HB í so máta tykist vera, at teir ikki longur hava ein Rógva Jacobsen at dúva uppá. Við sterka klaksvíkinginum í álopinum bar til hjá liðnum at leggja trýst, bara bólturin varð sendir langt niðan, men tann facettin restar í løtuni, og tí tykist liðið ofta leita eftir alternativum hættum at trýsta.

### Tordu at leypa á

Fleiri greinarar av føroyskum fótbólti hava seinastu vikurnar funnist at, at ov nógv lið í ov stóran mun spæla mest sum alibi-fótbólt, har bíða verður eftir mistøkum frá móstøðuni.

Í so máta var B36 eitt frískt lot mikukvøldið, tí ferð eftir ferð royndu teir at skapa yvirtalsstøður við at spæla skjótt niðaneftir. Fleiri ferðir eydnaðist hetta eisini, men at kalla hvørja ferð var felagsnevnarin, at seinasta sendingin restaði neyðuga neyvleikan.

Hanus Thorleifsson og Johan Ellingsgaard høvdu tó sínar møguleikar, tá teir seinast í hvørjum hálvleiki gjørdust leysir, uttan at teir tó megnaðu at finna leiðina fram við Tróndi Vatnhamar í HB-málinum. Ikki minst mundi Johan iðra seg, tí tíðin var væl og virðiliga farin um teir 90 minuttirnar, tá hann fekk sín møguleika.

Og so var tað eitt satt fornøjilsi at síggja bóltkynstrini hjá Alex José dos Santos á vinstra bakki. Við millimetur-neyvum sendingum var hann fleiri ferðir maðurin, sum smildraði HB-verjuna, men óneyvar temjingar ella skotroyndir bóru ikki ætlaðu málini við sær kortini.

Soleiðis endaði dysturin javnt, og tað kunnu báðir partar sum so vera nøgdir við. Hóast HB ikki hevur skorað í 180 minuttir nú, so leggja teir helst størsta dentin á, at einki mál er farið í gjøgnum so mong minuttir. Og enn halda teir so fast um oddasessin í deildini.

B36 hevur heldur ikki tapt, og hóast tríggjar javnleikir, so hava hesir verið móti teimum trimum, sum vórðu roknað sum favorittar, og í so máta er einki forgjørt hjá einum underdog at fáa stig við sær úr hvørjari uppgerð.

Skála-B68 0-1 (0-1):

# Skála í botnin

*Skála*

*B68*

**Triðja dystin á rað tapti Skála móti liði, sum liðið sannlíkt skal takast við í botninum, og nú eru Skálamenn aftastir í Formula-deildini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tepur tap móti ÍF og B71 høvdu gjørt sítt til at leggja trýst á Skála. Ráðini vóru avgjørt ikki til at tapa dystin, tá B68 vitjaði, um Skála ikki skuldi detta longur niður á talvuni.

Toftamenn høvdu hinvegin eisini trýst á sær. Fyrstu fýra umførini høvdu bert givið eitt stig, og tó at hugburðurin hevði verið góður, so telur hetta ikki veruliga við, tá úrtøkan verður gjørd upp.

Gestirnir boðaðu eisini skjótt frá, at teir ætlaðu sær í minsta lagi eitt stig fyri dystin mikukvøldið. Heldur enn at liggja og bíða, valdu teir at fara niðan á vøllin eftir Skála, og hetta gav eisini møguleikar.

### Sjálvmál avgjørdi

Tað gingu bara 18 minuttir, áðrenn einasta málið í dystinum fall, og tá hetta kom, var talan um sjálvmál. Badara, sum var eyðsýndur á miðvøllinum, legði innfyri, og har var Arnhold Berg somikið óheppin, at hann beindi bóltin í egið mál.

Málið tók líka sum luftina úr Skála, og næstu løtuna trýsti B68 heilt nógv í vóníni um at fáa næsta málið. Hetta kom tó ongantíð, og hinvegin átti Skála eisini sínar møguleikar í kontrafasuni.

Seinasta partin av dystinum valdu gestirnir ikki óvæntað at leggja seg longur aftur á vøllin, og tað gav Skála møguleikan at trýsta. Hóast talan ikki gjørdist um beinleiðis upplagdar møguleikar, so var talan í nøgvum førum um vandastøður, men aloftast høvdu verjan og ein væl leikandi Valda Filipovic tamarhald á hesum. Og høvdu teir ikki tað, bjargaði stólptin teimum, soleiðis at B68 ikki gjørdi Skála kynstrið eftir við sjálvmáli.

### Sperdir skálamenn

Hjá B68 gav dysturin uttan iva nakað av luft í botnstríðnum. Gaman í er liðið enn undir strikuni, men nú er samband við restina av feltinum at kalla. Og við heimadysti móti KÍ sum næsta punkt á skránni eru vónirnar ikki heilt ongar um, at liðið kann lyfta seg frá strikuni.

Hjá Skála sær hinvegin meira svart út. Tríggjar ferðir á rað hava teir verið eitt mál ov stuttir móti liðum, sum teir skulu vinna stig frá. Og tað hevur fyribils kostað dýrt í botnstríðnum